## Mentamálaráðið
FÓLKASKÚLADEILDIN

### FYRSTALÆRARASTARV Í SKOPUNAR SKÚLA

Starvið sum fyrstilærari í Skopunar Skúla verður lýst leyst til setanar frá 1. august 2006.
Í Skopunar skúla eru 35 næmingar í 5 árgangum. 5 lærarar starvast í skúlanum.

sansir.fo

**Søkt verður eftir fyrstalærara, sum**
- undir ábyrgd skúlamyndugleikanna skal hava fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna av virksemi skúlans.
- skal sýna leiðslumyndugleika og hegni at leiða
- dugir at samstarva og er fyrikomandi.
- hevur hugsjónir um skúlamenning, og hvussu menningarætlan verður sett í verk.
- á fólkaræðisligum støði skal fremja góðar arbeiðs-umstøður og gott samstarv millum næmingar, lærarar og onnur samstarvsfólk skúlans.
- er førur fyri at skilja støðuna hjá øðrum.

**Harumframt skal fyrstilærarin**
- hava hug og hegni til at átaka sær fyrisitingarliga ábyrgd.
- leggja dent á at fremja andsfrælsi, tolsemi og gott samarbeiði millum skúla og heim.
- vera førur fyri at loysa trupulleikar.
- vera førur fyri at útinna eina mennandi starvs-fólkaleiðslu og tryggja, at lærarar skúlans hava umstøður fyri fakligari menning.
- skapa virðing fyri skúlanum og umstøður hjá tí einstaka fyri samábyrgd og ávirkan.
- leggja dent á at menna skúlaskapin í kommununi.
- eggja næmingum og foreldrum at fáa sum mest burtur úr skúlagongdini bæði fakliga og sosialt.

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava fólkaskúlalæraraútbúgving og starvsroyndir í fólkaskúlanum.

**Lønar- og setanartreytir**
Setanarøkið er undir Mentamálaráðnum við fyribils tænastu í Skopunar skúla. Tann, ið settur verður, eigur at tola broytingar í starvinum.

Starvið verður lønt í lønarflokkunum 29.2, 29.3 og 31.3 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag. Starvið verður sett sum sáttmálasett starv uttan so, at tann, sum settur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.

Skylduga undirvísingartímatalið verður ásett eftir galdandi reglum.

**Umsóknir**
Umsókn saman við prógvi, C.V. o.ø. skal verða Mentamálaráðnum í hendi **í seinasta lagi týsdagin 4. apríl 2006 kl. 16.00.**

Umsóknin verður stílað til:
Mentamálaráðið
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn
ella við t-posti: mmr@mmr.fo

Tey, ið ynskja fleiri upplýsingar um starvið, kunnu ringja til Jenny Lydersen, undirvísingarleiðara, ella Olaus Jespersen, deildarstjóra, á tlf. 355050.

**Mentamálaráðið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.

# Hjálparfólk í Nes kommunu

Til barnagarðin søkja vit eftir:

**1 hjálparfólk at arbeiða 35 tímar um vikuna. Starvið er tíðaravmarkað frá 1. mai 2006 fram til 30. apríl 2007.**

Starvið er í barnagarðsstovu við 23 børnum í aldrinum í 4-6 ár.

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið í skala 1-5.

**Vit vænta at umsøkjarin:**
- Ynskir at geva børnunum umsorgan og kærleika
- Hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan dag saman við børnunum
- Hevur góð samstarvsevnir og kann taka ábyrgd.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Ingrid Hansen leiðara tlf. 448760/228460.

**Umsóknir**
saman við møguligum viðmælum skulu verða Nes kommunu í hendi í seinasta lagi **mikudagin 5. apríl 2006 kl. 12.00.**

**Nes Kommuna**

# Starv sum stuðul 15 t/v

Eitt tíðaravmarkað starv sum stuðul hjá næmingi í 5. flokki, sum hevur serligan tørv, er leyst at søkja. Arbeiðstíðin er 15 tímar um vikuna.

Starvið verður at seta sum skjótast ella í seinasta lagi 3. apríl.

**Starvið er tíðaravmarkað til 24. juni 2006.**

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um starvið frá Maritu Dalsgaard, skúlastjóra á tlf. 447332 ella 747765.

Umsóknir skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi **leygardagin 1. apríl kl. 12.00.**

Leggið við ljósrit av prógvi og møguligum viðmælum!

**Tofta skúli**
Postboks 41
FO-650 Toftir

*Í Tofta skúla ganga 189 næmingar í 11 flokkum.*
*Í Tofta skúla starvast 20 lærarar og 3 stuðlar.*

# Autolinefiskere søkes

Carisma Fish AS har følgende autolinefartøy:
m/v Vestkapp ex. Kamaro
m/v Sjøliner ex. Høgstein
m/v Kvitnes

Vi søker fiskere til våre båter som fisker i Barentshavet, i Eu-zona og ved Færøyane. Våre fartøy har godt kvotegrunnlag. Søker må ha sikkerhetskurs.

Kontakt
**Carisma Fish AS**
**Tlf. +47 57852900, +47 57852902**
**eller +47 90517981**
**eller e-post: post@carismaman.no**

# KVÍVÍKINGAR



**Ung sum gomul,**
**stór sum smá,**
**úti og heima.**

Nú ber til at gerast limur í bygdafelagnum Glæmuni við at flyta limagjaldið á kr. 75,- á eina av niðanfyri nevndu konti:
9191-144.755.8 / 6460 170.382.1
Giro: 203947

Lesið Sosialin - so eru tit við